# Trygdarútgerð uttan trygdarbeltir

**Tað er vorðin ein kapping millum bilverksmiðjurnar um at gera bilarnar so tryggar sum gjørligt, men um tey ferðandi í bilunum ikki sita í trygdarbeltum, er trygdarútgerðin til lítla nyttu**



*Nýggir bilar eru gjørdir soleiðis at teir geva eftir aftan og framman, meðan kabinan ofta er púra heil*

BILAR&TRYGD
*Magnus Gunnarsson*

Um vit sammeta nýggjar bilar, sum koma á marknaðin í dag, við teir sum komu fyri 20-30 árum síðan, kunnu teir als ikki samanberast hvat trygdarútgerð viðvíkur. Hvørja ferð at ein nýggjur bilur kemur á marknaðin við onkrari nýggjari trygdarútgerð, verður tað viðmerkt av motorjournalistum, sum royndarkoyra bilarnar. Um so næsti nýggi bilur sum verður royndarkoyrdur ikki hevur hesa útgerð, verður tað roknað sum eitt minus. Hetta ger, at bilverksmiðjurnar alla tíðina verða noyddar at hava nýggjastu trygdarútgerðina í teirra bilum. Serliga tá bilarnir verða krasj-testaðir hjá EuroNCAP, har bilarnir fáa upp til fimm stjørnur, um teir klára allar tær krevjandi krasj-testirnar frá øllum síðum, og um teir hava t.d. alarm, sum sigur frá, um tey ferðandi ikki brúka síni trygdarbeltir.

### Trygdarútgerð uttan trygdarbelti

Flestu bilarnir hava airbag framman, í síðunum, niður úr loftinum og nú eisini til knøini. Sjálv kabinan í bilunum er sum eitt trygdarbúr, t.v.s. at um bilurin kemur út fyri einum álvarsligum skaða, skal bilførarin og tey ferðandi í bilinum fáa minst møguligan skaða. Øll hendan trygdarútgerðin er til fyri at verja tey sum sita í bilinum. Men verjan og trygdin hjá bilføraranum og teimum ferðandi í bilinum, er treytað av at tey brúka síni trygdarbeltir, annars er øll trygdarútgerðin til lítla nyttu. Vit hava sæð tað so mangan, at bilar, sum hava verið við í álvarsligum ferðsluvanlukkum, har tey ferðandi í bilinum hava fingið stóran skaða ella eru deyð, ikki eru so illa farnir har sum fólkini hava sitið. Orsøkin er at bilarnir eru gjørdir soleiðis at teir geva eftir aftan og framman, meðan kabinan ofta er púra heil. Tað vil siga, at um tey ferðandi í bilinum høvdu brúkt síni trygdarbeltir, hevði støðan verið ein heilt onnur.

Í einum heitum og góðum bili er so lætt at undirmeta ta álvarsomu hóttandi styrki, sum tann nógva ferðin ber í sær. Um vit sammeta megina í einum samanbresti við 50 km/t, so samsvarar hon við at ein persónur dettur av 3. hædd í einum húsum og niður á asfaltið. Vit mugu øtast - bert við hugsanina. Hendan »fallstyrkin« verður fleiri ferðir størri, tá ferðin veksur. Tó eru tað mong sum tora at koyra við ongum trygdarbelti. Vit kunnu í hesum viðfangi nevna, at nágreiniligar vitskapligar kanningar eisini hava staðfest, at avleiðingarnar av eini ferðsluvanlukku verða helvtina minni hjá teimum sum brúka síni trygdarbeltir.




*Myndin vísir at ein samanbrestur við 90 km/t er sum at detta av 10. hædd*

*Mynd: Ferðslutrygd*




*Mynd: Ferðslutrygd*



# Jonhard Brøðraberg - 90 km/t á høvuðsvegunum

**Jonhard Brøðraberg, útróðrarmaður og fyrrverandi verkstaðseigari í Havn, sigur her sína hugsan um ymiskt í ferðsluni, sum hann heldur kundi verði øðrvísi. Hann heldur t.d. at mest loyvda ferðin í landsvegunum skuldi verið 90 km/t**

FERÐSLA
*Magnus Gunnarsson*

Jonhard Brøðraberg er ættaður av Eiði. Hann flutti til Havnar í 1962, tá hann fór í læru sum bilmekanikari á bilverkstaðnum hjá Sverra Djurhuus í Rættará. Meðan hann lærdi, hevði hann tveir hýruvognar koyrandi á bilstøðini Taxa 1313 í Niels Finsensgøtu. Hann arbeiddi eina tíð hjá Føroya Motor Co. í Hornabø. Í 1971 bygdi hann sær eini sethús í Gundadali og innrættaði sær ein bilverkstað í kjallaranum. Frá 1975-93 hevði hann egnan bilverksað har, hann hevði t.d. avtalu við Brøður Petersen, sum høvdu umboð fyri Volvo bilarnar, um service av teirra bilum, eisini umboðaði hann Brenderup viðfestisvognarnar. Hann hevði fólk í arbeiði, og fleiri lærdu til bilmekanikara hjá honum. Síðan hann gavst við bilverkstaðnum í 1993, hevur hann verið útróðrarmaður.



*Jonhard Brøðraberg í Havn heldur at tað skuldi verið loyvt at koyrt við 60 km/t eftir teimum góðu og beinu vegastrekkjunum í býnum, har sum útsýnið er gott, sum t.d. her á Marknagilsvegnum*

*Mynd: Jens K.Vang*

### Meira ferðslutalvur

Jonhard er eisini kendur fyri síni avgjørdu sjónarmið um ymisk samfelagsviðurskifti. Hann hevur nøkur hjartasuff um ymiskar ferðsluspurningar. Hann heldur t.d. at allir bilar skulu hava loyvi at koyra 90 km/t á høvuðsvegunum, 80 km/t er ov lítið á okkara góðu landsvegum. Samstundis skulu vit hava fleiri ferðslutalvur, sum vísa mest loyvdu ferð. Sum t.d. tá vit koma til talvuna, »bygt umráði«, skuldi ein ferðslutalva víst mest loyvdu ferð, so vistu øll tað, eisini tey fremmandu ferðafólkini sum koyra her. Hann heldur, at ferðafólk, sum koyra við egnum bili í Føroyum, eru alt ov illa upplýst um mest loyvdu ferðina.

Jonhard heldur eisini, at tað skuldi verið loyvt at koyrt við 60 km/t eftir teimum góðu og beinu vegastrekkjunum í býnum, har sum útsýni er gott sum t.d. eftir Marknagilsvegnum og yviri við Strond, 50 km/t er ov lítið. Jonhard heldur eisini, at avvarðandi myndugleikar áttu at sett spegl upp á teimum hættisliga megamótunum, har útsýnið er vánaligt, sum t.d. á vegamótinum Brattabrekka /Varðagøta, har má tann bilurin sum kemur út frá Brøttubrekku standa mitt á vegnum, um hann skal síggja um bilar koma frá vinstru niðan eftir Varðagøtu. Á sama hátt er úti á Viðarnesi á Vestaru Bryggju, við útkoyringina frá Statoil og Shell, har sæst einki til vinstru, eisini har hevði eitt spegl loyst trupulleikan.

### Royndarkoyrikort fyri øll

Á vegamótinum Tjaldursvegur/Hoyvíksvegur er eisini eitt vandamál. Bilar, sum koyra á Tjaldursvegnum og skulu út á Hoyvíksvegin, mugu standa á gonguteiginum fyri at síggja teir bilar, sum koyra eftir Hoyvíksvegnum. Hetta heldur Jonhard vera sera óheppi, hann vísir á, at tað hevði verið munandi tryggari fyri fótgangaran, um gonguteigurin bleiv fluttur eina billongd longur inn á Tjaldursvegin.

Hann heldur lítið um at bilførarar, sum koyra út á ein høvuðsveg og nerta við ein annan bil, skulu upp til eftiransandi koyriroynd og hava ein treytaðan dóm upp á 3 ár hangandi yvir sær.

Jonhard sigur, at uppskot hevur verið frammi um at ungir dreingir millum 18 og 24 ár skulu fáa eitt royndarkoyrikort, tí teir eru atvoldin til tey flestu ferðsluóhappini. Hann heldur, at tað er í ordan við einum royndarkoyrikorti, men so skulu øll í hesum aldursbólki byrja við einum royndarkoyrikorti, ikki pilka nøkur fólk burturúr. Annars heldur Jonhard at Ráðið fyri Ferðslutrygd skal koma aftur til sítt upprunaliga endamál, við at leggja meira dent á at upplýsa skúlabørn um vandan í ferðsluni.

Jonhard sigur, at um hesi vandamál í ferðsluni, ið hann hevur nevnt her, høvdu verið broytt, so hevði tað lætt um í ferðsluni bæði hjá teimum sum ganga og hjá teimum sum koyra. Øll í ferðsluni høvdu verði meira trygg. Hann vónar at avvarandi myndugleikar taka hetta til eftirtektar og loysa hesi vandamál sum skjótast.




*Jonhard Brøðraberg heldur at avvarðandi myndugleikar áttu at sett eitt spegl upp á teimum hættisligu vegastrekkjunum, har útsýnið er vánaligt, sum t.d. her á horninum Brattabrekka/Varðagøta*

*Mynd: Jens K. Vang*